

# Klubbin letur uppaftur

**Um mánaðarskifti letur klubbin á Tvøroyri upp sum alment dansistað**

Randi Jacobsen

Umleið eitt ár er liðið, síðan Tvøroyrar Klubbi læt aftur, men gongur sum væntað, letur klubbin upp aftur um mánaðarskiftið.

– Nú er bara eftir at fáa dansi- og skeinkiloyvi, sigur Jóhan Petur Olgarsson, sum nú eigur klubban.

Seinastu nógvu árini eru ongar ábøtur gjørdar á húsið, men tað er gjørt nú. Niðasta hæddin er øll gjørd av nýggjum, og ymist er skift út samsvarandi krøvunum frá myndugleikunum. Elligamli klubbin var fullkomiliga niðurslitin.

Klubbin verður eins og áður vertshús, men munurin verður, at nú verða eingir limir. Øll yvir 18 ár fara at hava atgongd.

– Klubbatíðin er farin, ásannar Jóhan Petur Olgarsson.

Ætlan hansara er at hava almennan dans um vikuskiftini, og fótbóltur fer at verða vístur á stórskíggja.

Hóast undanfarnu eigarar ikki fingu klubban at bera til, hevur Jóhan Petur Olgarsson góðar vónir. Hann hevur sínar royndir sum formaður í húsanevndini duravørður og barrvørður í TB-húsinum.

– Tað eigur at bera til, sigur hann.

Navnið verður Klubbin, tí sum Jóhan Petur Olgarsson sigur, so hvat navn hann hevði givið húsinum, fara fólk ongantíð at nevna tað annað enn Klubbin.

# Rendi á bingju í sjónum

**Óvist er, um farmaskipið Havfrakt, sum í hósdagin rendi á okkurt í sjónum, kemur til Føroya at verða umvældur**




Randi Jacobsen

Farmaskipið Havfrakt var júst farin úr Tórshøfn í Íslandi og skuldi til Noregs við fiskamjøli, tá ið hann rendi á okkurt í sjónum. Helst hevur tað verið ein bingja, sigur Álvur Højgaard, reiðari.

Hann sigur hetta úr frá, at buglan, sum skipið fekk í botnin er tvørturum. Buglan er ikki meira enn einar tveir fermetrar.

Í lastini hjá Havfrakt vóru 1200 tons av fiskamjøli, og lastin verður løgd upp í Íslandi. Hitt skipið hjá Frakt & Sandi, Havsund er statt í Noregi og fer væntandi yvir eftir lastini.

Reiðaríið hevur ikki tikið støðu til, um Havfrakt skal umvælast í Føroyum ella í Íslandi. Tað veldst um, nær Havfrakt kann sleppa á sleipistøð í Íslandi.

Skaðin er ikki líka stórur, sum tá ið Havfrakt í oktober rendi á eitt sker í Noregi.

Tað kemur illa við hjá reiðarínum, at Havfrakt innan fyri so stutta tíð tvær ferðir skal hava verið fyri óhappi. Skipið er væl tryggjað, men tað verður kortini ein fíggjarligur missur, sigur Álvur Højgaard.

## Grønlendska blaðmodellið:

# Eitt miðlahús – tvey bløð

Seinasta búskaparkreppan hevur rakt fjølmiðlarnar í Vesturheiminum meint. Eitt av teimum londum, sum kennir til sviðan av hesi kreppuni, er okkara granni fyri norðan, Grønland. Har hava privatu miðlarnir sæð eina munandi niðurgongd í lýsingum, umframt at almenni útberingarstuðulin herfyri varð tikin frá teimum báðum tíðindabløðunum, Sermitsiaq og AG Grønlandsposten.



*Samstarvið millum Sermitsiaq og AG Grønlandsposten hetta fyrsta árið hevur riggað væl siga teir báðir blaðstjórarnir Poul Krarup og Inga Dora Markussen*

Mynd Jan Müller

Bløðini hava tikið avleiðingarnar av hesi óhepnu gongd og hava verið tvungin til at leggja saman, soleiðis at tey í dag húsast undir somu lon men kortini eru at meta sum tvey óheft bløð við egnum redaktiónum. Annars hava tey felags umsiting og røkja fleiri funktiónir í felag.

Tað er av alstórum týdningi at forða fyri blaðmonopoli í Grønlandi, og royndirnar higartil við teimum ymiskum bløðum í sama húsi hava verið væleydnaðar. Kortini er langt á mál, tí ikki minst tað almenna Grønland ger gerandisdagin truplan eitt nú við heldur at lýsa á útlendskum heimasíðum enn í grønlendsku bløðunum. Bløðini koma út eina ferð um vikuna umframt at tey hava eina felags netsíðu, sum eisini er tann mest vitjaða í Grønlandi, sermitsiaq.ag.gl.

Hvussu hevur so hilnast eftir hetta fyrsta árið undir sama taki! Tað hevur Jan Müller frá Miðlahúsinum í Vágsbotni sett sær fyri at frætta nærri um og setti hann teimum báðum blaðstjórunum, Poul Krarup á Sermitsiaq og Inga Dora Markussen á AG Grønlandsposten stevnu í hugnaligа miðlahúsinum í Nuuk.

Samrøðan við tey bæði kemur í morgunsendingina á Rás2 mánadagin klokkan 9.30.

### Lars Emil endursendur

Rás2 fer eisini at endursenda samrøðu úr Grønlandi nú leygardagin klokkan 11. Tað er samrøða Jan Müller hevði við grønlendska fólkatingsmannin og vinnulívsmannin Lars Emil Johansen í desember eitt nú um manglandi samstarvið millum Føroyar og Grønland.